# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Gestur við Høgadalsá deyður

Hósdagin 26. februar andaðist Gestur við Høgadalsá í Havn, 67 ára gamal.

Gestur var havnarmaður. Foreldrini vóru Hanna, f. Poulsen, ættað av Kirkju, og Hanus við Høgadalsá úr Kaldbak. Gestur var næstelstur av fýra systkjum, hini eru: Hervør Durhuus, Guðrun Dalsgarð og Úlvur við Høgadalsá.

Gestur fór fyrstu ferð til skips sum 14 ára gamal við trolaranum Fiskanes og var ofta til skips í summarfrítíðini, eisini meðan hann gekk í studentaskúla. Hann sigldi seinni við øðrum skipum sum t.d. Boðanesi, Ólavi Hvíta og Grími Kamban.

Í 1967 giftist Gestur við Karin, f. Ludvig Herdalur, ættað úr Vági, og í 1968 fóru tey til Danmarkar, har Gestur gekk á telegrafistskúla í Keypmannahavn



og tók prógv í 1970.

Hann sigldi eitt skifti sum telegarfistur við trolaranum Leivur Øssursson og seinni við Kap Farvel. Tá so Smyril (Morten Mols) bleiv keyptur í 1975, fekk hann starv sum telegrafistur har.

Í 1979 fekk hann starv hjá Postverkinum, sum bleiv hansara lívsstarv. Fyrstu árini á posthúsinum í miðbýnum í Havn og seinni á høvuðsposthúsinum á Óðinshædd. Har arbeiddi hann til 2006, tey flestu árini í brævsorteringini.

Gestur var havnarmaður við stórum H og B36-ari burturav.

Karin og Gestur búsettust við Velbastaðvegin og fingu børnini Hanus og Turið umframt ommu- og abbabørn.

*-red*

## †

## Andlát og jarðarferðir

**Poula Mohr í Fuglafirði** fer til gravar úr Siloa mikudagin 4. mars kl. 13.

**Svanhild Seyer Andersen**, ættað úr Tórshavn, fer til gravar hósdagin kl. 13 úr Oppesundsby Kirkju.

Kistan við **Elly Atlantu Joensen** fer úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi týskvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður mikudagin kl. 13 frá Frelsunarherinum í Vági.

Lítla **Lív Mohr Eyðunardóttir, Tórshavn**, Dóttir Eyðun Christiansen og Gunnvá Mohr, andaðist á Ríkissjúkrahúsinum fríggjadagin 27. februar. Jarðarferðin verður lýst seinni.

**Edith Dam á Argjum** andaðist á Landssjúkrahúsinum leygardagin, 65 ára gomul. Bønarhald verður í kapellinum á Landssjúkrshúsinum týskvøldið kl. 19. Jarðarferðin verður úr Argja kirkju mikudagin kl. 13.

## †

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæra kona, dóttir og systir okkara

**Kristina Weihe**
vanliga nevnd Nina

andaðist á Vejle sjúkrahúsi, sunnudagin 1. mars, 68 ára gomul.
Jarðarferðin verður lýst seinni.

*Vegna tey avvarðandi*
**Helgi, Anna og systkini**

Fyri 30 árum síðan:

## Oljubilur í samastoyti

Í Sosialinum 3. mars 1979 er hendan myndin av einum samanstoyti í J. Paturssonargøtu í hálku.

Ein oljubilur hjá oljufelagnum Esso, sum var á veg oman brekkuna í J. Paturssonargøtu í hálku, bremsaði og fór runt á vegnum við teimum avleiðingum at hann tók tríggjar aðrar bilar við sær.

Nakað av olju lak úr oljutanganum á Esso bilinum, men tað eydnaðist skjótt at steðga lekanum.

Á myndini er ein VW Transporter hjá Esso, ein Audi 80 hýruvognur og ein Mazda 929 stationcar.



sosialurin
Nr. 17 – leygardagur 3. mars 1979



OLJUBILUR Í SAMANSTOYTI

Eftir at tátt hevði verið í góða viku, vóru vegirnir aftur hálir mikumorgunin.

Hetta tók
Havn til
tíið fráb
ferðsluóh
og 10.
skaða, m
ongin.
Í J. P
fingu fýr
ein tanga
brekkuna
teimum
hann sna
tríggjar a
Nakað
tanganum
aðist skjó

## Rætting

Í minningarorðunum í vikuskiftisblaðnum var eitt navn komið skeivt fyri.

Talan er um minningarorðini um Paulu Jespersen. Vit komu at skriva Poula ístaðin fyri Paula.

Tað var ommudótturin Paula í Íslandi, sum skrivaði minningarorðini, og ikki Poula, sum vit skrivaðu.

Vit biðja orsaka mistakið.

*-red*



**Móttøka**
Í sambandi við runda føðingardagin og at eg skjótt gevist sum kommunulækni, verður brunch í bygdarhúsinum í Miðvági 28. mars frá kl. 11.00 til 15.00. Tey, sum vilja gleða meg við at koma, vinarliga sigið frá á tlf. 332150 / 282250 ella 333318, 273793 millum kl. 18–20 innan 18. mars.

**Elisabeth Thorsteinsson**

**Dagurin**
**3. mars. Húngunn**, deyð ár 1003. Føroysk eftirgerð av týska navninum Kunigunde og varð skrivað Kunigunn, tá ið álmanakkin kom á føroyskum. Hon varð gift týska keisaranum Heindrikki II og læt byggja bæði kleystur og kirkjur. Navnið merkir mæt stríðskvinna.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*

## Tøkk



Eg vil við hesum takka tykkum, sum mintust meg á ymiskan hátt á 85 ára degnum.

*Við heilsan*
**Símun P. Poulsen**